## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin regn av og á. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og fyrrapartin ælingur, men eisini sólglottar. Seinnapartin hækkar hann upp í útnyrðing og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið lækkar hann niður í útsynning og ælingur. Hitin millum 11 og 14 stig.

**V eðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av vestri, sunnudagin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 14 og 18 stig.

# Norðlýsið selt

**Norðlýsið skiftir nú eigarar. Smyril Line hevur verið høvuðseigari við meira enn einum helmingi, men nú hava Birgir Enni og aðrir keypt Norðlýsi. Men virksemið við vælumtókta ferðamannaskipinum verður ikki stórvegis broytt**



FERÐAVINNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Norðlýsið er kend mynd við bryggju í Havn og eisini kend mynd millum oyggjarnar á summri. Smyril Line hevur verið høvuðseigari við meira enn einum helmingi, men nú hevur Smyril Line selt sín part.

Hetta váttar Jóannes á Váli frá Smyril Line. Hann sigur at sølan er komin undir land og verður avgreidd í næstum.

- Tað hevur verið upp á tal at selja og sølan verður avgreidd í næstum, sigur Jóannes á Váli.

Um orsøkina til søluna sigur hann, at Smyril Line hevur verið við til at byrjað so nógv ymiskt virksemi, so sum gistingarhús og annað, men at ætlanin nú er at savna seg um høvuðsvirksemið, nevniliga Norrønu.

- Tí er tíðin komin, til at aðrir taka yvir, sigur Jóannes á Váli viðvíkjandi tí veruleika, at Smyril Line selir síni 53% í Norðlýsinum.

### Birgir og aðrir

Birgir Enni, sum er og hevur verið skipari á Norðlýsinum á mongu ferðunum við ferðafólki, er ein teirra, sum framyvir fer at reka Norðlýsi. Hann og aðrir áhugaðir eru nýggir eigarar av Norðlýsinum.

- Tað eru nakrir av gomlu eigarunum og so nakrir nýggir, sigur Birgir Enni.

Hvørki Birgir Enni ella Jóannes á Váli vilja beinleiðis nevna søluprísin. Birgir Enni er tó væl nøgdur, tí skipið er í góðum standi. Hann sigur, at tá sølan endaliga er avgreidd, er ætlanin at partarnir koma við eini felags frágreiðing um eigaraskiftið.

Um virksemið sigur Birgir Enni, at tað framvegis verður sigling við ferðafólki, vælumtóktu konsertirnar úti í Hesti, fiskitúrar og annað, men kanka okkurt nýtt verður á skránni, men stórvegis brpytingar verða ikki, nú eigaraskifti fer fram.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -- |
| Seyðisfjørður | -- |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 22 |
| London | 26 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 18 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 28 |
| Keypmannah. | 27 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 30 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 13 |
| New York | 31 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1011 hPa. yvir Íslandi fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani verður yvir Føroyum hósnáttina.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/7 kl. 06[00]– 12/7. 06[00]. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 25,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 11/7 kl. 06[00]– 12/7 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 27,2 mm

Brúdarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast




## VESTFALLSKYRRINDI

5. juli Jørðin longst frá sólini
6. juli Tendring
8. juli Mánin longst frá jørðini
14. juli Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. Juli | 11.55 | - | 10.55 | 23.32 | 11.10 | 23.47 | 01.55 | 13.55 | 02.55 | 14.55 | 10.10 | 22.47 | 09.10 | 21.47 | 00.20 | 12.10 | 01.20 | 13.10 | 11.40 | - | 00.55 | 12.55 |
| 14. Juli | 00.32 | 13.04 | - | 12.04 | - | 12.19 | 02.32 | 15.04 | 03.32 | 16.04 | 11.19 | 23.51 | 10.19 | 22.51 | 00.47 | 13.19 | 01.47 | 14.19 | 00.17 | 12.49 | 01.32 | 14.04 |
| 15. Juli | 01.36 | 14.08 | 00.36 | 13.08 | 00.51 | 13.23 | 03.36 | 16.08 | 04.36 | 17.08 | - | 12.23 | 11.23 | 23.58 | 01.51 | 14.23 | 02.51 | 15.23 | 01.21 | 13.53 | 02.36 | 15.08 |
| 16. Juli | 02.43 | 15.05 | 01.43 | 14.05 | 01.58 | 14.20 | 04.43 | 17.05 | 05.43 | 18.05 | 00.58 | 13.20 | - | 12.20 | 02.58 | 15.20 | 03.58 | 16.20 | 02.28 | 14.50 | 03.43 | 16.05 |
| 17. Juli | 03.27 | 15.52 | 02.27 | 14.52 | 02.42 | 15.07 | 05.27 | 17.52 | 06.27 | 18.52 | 01.42 | 14.07 | 00.42 | 13.07 | 03.42 | 16.07 | 04.42 | 17.07 | 03.12 | 15.37 | 04.27 | 16.52 |

5 707265 100036 >